# Mentanarvika í Runavík

Mentanarvikan í Runavíkar kommunu verður frá sunnudegnum 28. oktober til sunnudagin 4. november. Hesa vikuna bjóðar býurin uppá listaframsýningar, tónleikatiltøk, føroyskan dans, barnatiltøk, fyrilestrar, gongutúrar, ítrótt og mangt annað. Undirhald og mentan fyri øll. Í somu viku verður aljóða vinnustevnan, Faroexpo 2007, hildin í Runavík. Faroexpo verður hildin í døgunum 29. oktober til 4. november 2007. Kunningarstovan í Runavík, heitir á fól, ið eru áhugaði í at lutttaka í Mentanarvikuni um at seta seg í samband við kunningarstovuna í Runavík



# Búi og Dánjal Norðurbryggjuni

Í hesum døgum ferðast teir kring Føroyar, undir heitinum Æventýrferðin, fríggjadagin 5. oktboer standa teir á odda fyri hvør sínum bólki Budam og Dánjal á Neystbø á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn. Eftir flotta konsert á ársins Spotfestivali, og frálíkum ummælum í Føroyum og Íslandi, eru stórar vónir til konsertina við Budam. Dánjali á Neystabø stendur fyri upphitingini, sum eisini hevur fingið frálíka umrøðu í Føroyum, á Asfalt koyrdu hann og vælleikandi bólkurin áhoyrararnar um koll við sínari innniligu orku og swing!

**- Kvinnur í Javnaðarflokkinum vilja nú hava greitt svar frá løgmanni fyri at vita um hann veruliga meinar nakað við herrópini um at fáa fleiri kvinnur upp í politikk ella um tað bara er ein sápubløðra**



*Fyribils hava kvinnurnar bara sæti á áhoyraraplássinum í løgtinginum. Men nú vilja tær, at Løgmaður skal vísa í verki, at hann veruliga meinar nakað við tað, tá ið hann og Javnaðarflokkurin ferð eftir ferð føra fram, at teir vilja hava fleiri kvinnur upp í politikk, sigur Ingrid Henriksen, javnaðarkvinna í Havn*

# Nú skal løgmaður standa sína roynd

KVINNUR Í POLITIKKI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Nú vilja vit hava heilt greið boð frá løgmanni um hann veruliga meinar nakað herrópið um at fáa fleiri kvinnur upp í politikk.

Tað sigur Ingrid Henriksen, javnaðarkvinna í Havn og limur í javnstøðubólkinum hjá Javnaðarflokkinum.

Ein bólkur av javnaðarkvinnum úr øllum landinum hevur nú biðið løgmann um fund fyri at fáa hann at virka fyri at fáa fleiri kvinnur í politikki.

Men møguliga koma kvinnur úr øðrum flokkurin eisini við í bólkin, sum skal hava fund við løgmann.

## Álvari ella sápubløðra

Løgmaður og Javnaðarflokkurin hava javnan og savnan ført fram, hvussu stórur tørvur er á at fáa fleiri kvinnur upp í politikk.

Og nú vilja javnaðarkvinnur hitta hann andlit til andlits fyri at fáa greiði á, um hann veruliga meinar nakað við tað.

- Meinar løgmaður nakað við at fáa fleiri kvinnur upp í politikk, hevur hann nú eitt einastandandi høvið til at gera nakað við tað beinanvegin, so at vit longu frá hesum løgtingsvalinum, ið stendur fyri durum, kunnu fáa fleiri kvinnur upp í politikk, sigur Ingrid Henriksen.

Tað, sum hann hugsar um er grein 18 í vallógini, sum gevur einum flokki loyvi til at stilla fleiri listar upp í sama valdømi.

Men í teimum førum, at tað er brúkt, hevur vallógin verið tulkað soleiðis, at listarnir verða mettir sum tveir listar og at atkvøðurnar sostatt verða taldar hvør sær.

Tað kann gera tað torførari hjá flokkum við fleiri listum at fáa umboð á ting.

## Trygd frá løgmanni

Tað, sum Javnaðarkvinnurnar vilja hava, er at fáa løgtingið at staðfesta, at hevur ein flokkur fleiri listar í einum valdømi, skulu listarnir metast sum ein og at atkvøðurnar sostatt skulu teljast saman.

Og tað er hetta, sum javnaðarkvinnurnar vilja tosa við løgmann um.

- Vit vilja hava løgmann at tryggja okkum, at ein politisk avgerð verður tikin um at atkvøðurnar verða taldar saman, longu frá hesum valinum at rokna, sigur Ingrid Henriksen.

Hon sigur, at svarið frá honum fer at avdúka, um hann veruliga meinar nakað við tað, tá ið hann vil hava fleiri kvinnur upp í politikk.

Hon ivast ikki í, at verða atkvøðurnar taldar saman, fara vit at fáa ein kvinnulista burturav hjá Javnaðarflokkinum í Suðurstreymoy og kanska aðrastaðni við.

Men hóast úrslitið verður, at atkvøðurnar ikki verða taldar saman, vil hon ikki útihýsa, at kvinnulistar verða stillaðir upp kortini.

- At stilla kvinnulistar upp, er besti mátin at styrkja kvinnuligu umboðanina á løgtingi beinanvegin og tí vilja vit hava greiði á málinum nú, sigur Ingrid Henriksen.

## Løgmaður ikki heitur fyri kvinnulista

Í Sosialinum í gjár segði løgmaður, at hann er opin fyri at tosa við Javnaðarkvinnurnar um at fáa betri javnstøðu í politikki.

Hann vildi kortini ikki nágreina hetta nærri, fyrrenn hann hevði tosað við tær, tí hann vónaði at tær høvdu fleiri hugskot um, hvussu fleiri kvinnur kundi fáast upp í politikk.

Hann viðgekk kortini, at hann er ikki heitur fyri serligum kvinnulistum, tí tey áttu øll at ganga øksl móti øksl.

- Tað hava vit gjørt fyrr, og tað átti at borið til aftur nú, segði løgmaður í Sosialinum í gjár.

Hann legði kortini afturat, at sjálvandi er tað rætt at arbeiða fyri at fáa javnstøðu í uppstillingina, og at bera so í bandi, at kvinnurnar fáa betri umstøður í valstríðnumø

# Royking skal bannast!

**Sambært einum nýggjum uppskoti frá Hans Paula Strøm skal øll royking nú bannast. Bæði á privatum arbeiðsplássum, í dansihølum og á matstovum. Og forðboðið skal nú eisini røkka heilt inn í privatu heimini**

FYRIBYRGING
*Eydna Skaale*
*eydnaskaale@sosialurin.fo*

Nýggja uppskotið er ein kollvelting innan føroyskan roykipolitikk. Lógarfesti rætturin til roykfrítt umhvørvi, sum øll alment sett starvsfólk eru vard av, skal nú víðkast, soleiðis, at eisini starvsfólk á privata arbeiðsmarknaðinum og viðskiftafólk skulu verjast við lóg.

Hetta hevur við sær, at tað ikki longur verður loyvt at roykja innandura á privatum arbeðisplássum, har tað starvast fleiri enn eitt fólk. Á matstovum, í dansiog skeinkistøðum og á støðum har almenningurin hevur atgongd móti gjaldi ella uttan gjald, verður eisini bannað at roykja.

Forboðið røkkur tó enn longri, nevniliga heilt inn í privatu heimini. Tí nú verður roykiforboð sett í privatum heimum meðan almenn ella alment fíggjað tænastuveiting verður veitt til persónliga ella praktiska hjálp. Tað merkir, at fólk, ið t.d. hava heimahjálp ella stuðul, ikki hava loyvi at roykja inni hjá sær sjálvum, meðan hjálpin fer fram. Tí tænastufólkini hava lógarfestan rætt til roykfrítt arbeiðsumhvørvi.

Í serligum førum kunnu undantøk tó gerast, treytað av, at roykurin ikki er til ampa fyri onnur.

Dentur er eisini lagdur á at verja børnini ímóti passivari royking. Royking eigur ikki at vera ein dagligur partur av lívinum hjá børnum og ungum, og tí verður heldur ikki loyvt at roykja í kommunalu dagrøktini, meðan børn verða ansað.

## Minka um heilsuskaðarnar

Sambært Hans Paula Strøm er nýggja lógin eitt týðandi stig á leiðini til at minka um tubbaksnýtsluna og harviðeisini um heilsuskaðarnar, ið standast av royking.

Landstýrismaðurin ætlar at røkka endamálinum við ymsum átøkum, sum bæði saman og hvør sær skulu vera við til at minka um tubbaksnýtsluna.

Hetta verður m.a. gjørt við at bannað lýsingum fyri tubbakki. At tubbaksvørur eru sjónligar á sølustøðum verður mett sum lýsing fyri hesum vørum. Tí verður nú bannað at hava tubbaksvørur á sjónligum støðum á sølustøðum.

Mett verður, at ein og hvør lýsing fremur søluna, og tí væntar Hans Pauli Strøm, at um lýsingarnar verða bannaðar, fer hetta at hava við sær, at nýtlsan fer at minka. Harvið fara heilsuskaðarnir, sum standast av royking og passivari royking, eisini at minka, og hetta er tí eitt fyribyrgjandi átak í sær sjálvum.

Nýggja uppskotið frá Hans Paula Strøm er í dag farið út til hoyringar hjá fleiri enn 70 stovnum og feløgum.